# UR TIL STÓRAR



*Enn einaferð mælir ráðgevandi nevndin til stórar skerjingar av toska-, upsa-og hýsuveiðini undir Føroyum – og á Føroyabanka skal als eingin toskaveiða fara fram Mynd: Vilmund Jacobsen*

hendan gongdin er við at venda.

Í triðja lagi sigur ráðgevandi nevndin, at veiðitrýstið eftir hýsu hevur verið ov stórt.

- Vit hava mælt til, at ikki skal fiskast meira burtur úr stovninum enn 20% - í tali – av fiski, men síðan lógin um vinnuligan fiskiskap varð sett í verk, hevur veiðitrýstið í miðal verið 28%. Seinnu árini er trýstið tó minkað, og í 2009 varð trýstið mett at vera júst 20%. Sostatt er tað ikki veiðutrýstið, ið er størsta orsøkin til, at gýtingarstovnurin er so lítil, men heldur tilgongdin saman við tí vánaliga vøkstrinum.

ICES sigur, at veiðitrýstið eftir hýsu sjálvsagt má stillast eftir, hvussu stovnurin er fyri, og framskrivingar vísa, at sjálvt við ongum hýsufiskiskapi, vil stovnurin vera verandi lítil í eina tíð enn.

- Við støði í fyrivarnisregluni mæla vit tí til, at eingin beinleiðis fiskiskapur verður eftir hýsu í komandi fiskiári – og at hjáveiðan í øðrum fiskiskapum verður so lítil sum møguligt. Eisini eigur ein ætlan at leggjast fyri at fáa stovnin at koma fyri seg aftur.

**» botnfiskastovnarnar eru útlitini bjartari í ár enn í fjør, men hetta sæst kortini bert í lítlan mun aftur í ráðgevingini hjá ICES...**

JÁKUP REINERT

### Upsaveiða minkast

Um upsa undir Føroyum, sigur ráðgevandi nevndin hjá ICES, at vegna ávísar lívfrøðiligar umstøður, serliga tann sera lítla vøksturin av upsa, sum hevur verið seinastu árini, hava vanligu stovnsmetingarnar ikki verið góðkendar av ICES seinastu árini.

Men á einum serligum fundi í ICES í februar í ár vórðu ávísar ábøtur gjørdar, og nú er stovnsmetingin góðkend.

ICES sigur, at veiðan eftir upsa hevur verið søguliga høg seinastu fimm árini. Gýtingarstovnurin hevur verið væl fyri, men er nú í minking. Veiðitrýstið er tó alt ov høgt.

Tilgongdin av upsa hevur verið væl oman fyri miðal flestu av seinastu 10 árunum, men tykist nú minkandi. Við so góðari tilgongd var væntandi, at gýtingarstovnurin ikki var í minking, sum hann nú er mettur at vera. Orsøkir til hetta eru mest sannlíkt, sigur ráðgevandi nevndin hjá ICES, at veiðitrýstið er ov stórt, og at vøksturin er so lítil.

- Vit mæla tí til, at veiðitrýstið verður minkað við 38% í mun til verandi veiðitrýst – og at gýtingarfriðingarnar av upsa halda fram, sigur ráðgevandi nevndin hjá ICES í sínari tilráðing.

*vilmund@sosialurin.fo*